Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 23/2015 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, um broytingar í hjúnabandslógini, frá Jógvan á Lakjuni, løgtingsmanni**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

Um lógaruppskotini um broytingar í hjúnabandslógini, sum í løtuni eru til viðgerðar í Løgtinginum, verða samtykt:

1) Heldur løgmaður so, at tað er góður lóggávusiður, at Løgtingið samtykkir eina løgtingslóg, sum er í ósamsvari við aðra galdandi lóggávu í Føroyum?

2) Kann løgmaður veita trygd fyri – hóast kirkjulógin verður broytt – at eitt borgarliga vígt par av sama kyni ikki við tilvísing til hjúnabandslógina hevur rættarkrav upp á kirkjuligt vælsignilsi?

**Svar:**

**Til 1**. Lóggávustarv løgmans eftir stýrisskipanarlógini er rættuliga greitt. Løgmaður og landsstýrismenn hava rætt at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, og tey av Løgtinginum samtyktu lógaruppskotini skulu staðfestast av løgmanni fyri at fáa lógagildi. Sum varandi at løgmálum ráðgevir Løgmansskrivstovan øðrum stjórnarráðum í lógatekniskum spurningum.

Løgmaður hevur eftir stýrisskipanarlógini ikki eftirlit við Løgtinginum og tingmonnum. Tað er beint øvugt. Løgtingið og tingmenn hava eftirlit við løgmanni.

Tingmenn eru, eftir stýrisskipanarlógini § 23, bert bundnir av egnu sannføring síni og standa veljarunum til svar, hvørja ferð løgtingsval er. Teir hava rætt at leggja uppskot fyri Løgtingið. Í hesum sambandi fáa teir ráðgeving frá skrivstovustjóra løgtingsins, sum sbr. tingskipanini § 22, ansar eftir, at øll tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt.

Tá so er, meti eg ikki, at tað er rætt av løgmansembætinum at svara hesum spurningi. Tað er ikki rætt av embætinum at meta um lógardygdina av einum lógaruppskoti, sum landsstýrið ikki hevur lagt fyri Løgtingið, og sum løgtingsumsitingin í hesum førinum bæði løgfrøðiliga, lógartøkniliga og málsliga hevur ábyrgdina av.

**Til 2**. Løgmaður kann ikki veita trygd fyri ávísari lógartulking, tá ið lógaruppskotið er samtykt. Tað er upp til røttu fyristingarmyndugleikar at tulka lógina, tá ið tað kemur hartil. Í seinasta enda er tað upp til dómstólarnir at gera endaligar tulkingar av lóggávuni.

Løgmansskrivstovan, 10. februar 2016

Aksel V. Johannesen
løgmaður